# Ongar motorsúkklur til Grønlands

**Meðan talið av motorsúkklum ongantíð hevur verið so stórt sum nú her hjá okkum, er tað ikki soleiðis allastaðni í danska kongaríkinum. Í Grønlandi hevur seinastu 26 árini als ikki verið loyvt at innflyta motorsúkklur**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í ár eru 26 ár liðin síðan grønlendska landsstýri setti forboð fyri innflutningi av motorsúkklum.

"Det er landsstyrets opfattelse, at motorsykler generelt ikke er egnede som transportmiddel i Grønland, og de mange dødsfald, som skyldtes motorsykelulykker, gør, at landsstyret ikke finder, at der er behov for at ophæve forbuddet", segði landstýrismaðurin í ferðslumálum Jørgen Wæver Johansen, herfyri, tá uppskot var frammi um at avtaka bannið móti innflutningi av motorsúkklum. Hann avvísti blankt at loyvi aftur verður givið til innflutning av motorsúkklum til Grønlands.

Tað eru bert nakar heilt fáar motorsúkklur í Grønlandi, sum vórðu innfluttar áðrenn forboðið varð sett í gildi í 1980.




*Meðan talið av motorsúkklum ongantíð hevur verið so stórt sum nú her hjá okkum, er tað als ikki loyvi at innflyta motorsúkklur til Grønlands*

# Tín ferð kann bjarga




*Mannakroppurin tolir so dánt at verða ákoyrdur við 30 km/t. Men at verða ákoyrd við 50 km/t, tola vit ikki, uttan vit vórðu gjørd av stáli*

*Mynd: RFF*

**Kemur tú so illa fyri, at tú rennir á eitt fólk, er stórur møguleiki fyri, at tú bjargar tí lívinum, um tú koyrir við 30 km/t. Koyrir tú harafturímóti við 50 km/t er í alraflestu førum deyðin vísur**

FERÐSLUTRYGD

Sera neyvar kanningar hava sýnt, at 6 av 10 gongufólkum, sum verða ákoyrd við 50 km/t, doyggja. Men er ferðin 30 km/t, so doyr "bara" 1 av 10.

Hesin munur stendst av avmarkaðu kropsligu fortreytunum. Mannakroppurin tolir so dánt at verða ákoyrdur við 30 km/t. Men at verða ákoyrd við 50 km/t, tola vit ikki, uttan vit vórðu gjørd av stáli í orðsins veruliga týdningi.

Harumframt eigur at verða havt í huga, at tað er nógv minni vandi hjá bilum, sum koyra 30 km/t, at koyra á fólk, enn um koyrd verður 50 km/t. Orsøkin er tann, at bilførari, ið koyrir 30 km/t, megnar betur at steðga, áður enn skaðin er hendur.

Tað er tað minst varda menniskjað, sum er í mesta vanda at verða álvarliga skatt í ferðsluni, og tað er tí tað óvarda menniskjað, ið ásetur, hvussu ferðslukervið skal verða gjørt.

*Kelda: www.ferdslutrygd.fo*

## Ansið eftir okkum

**Tað er ikki vandaleyst at arbeiða á vegunum mitt úti í ferðsluni. Tí heitir Landsverk á bilførarar um vísa varsemi og virða skeltini, ið verða sett upp í sambandi við vegarbeiði á landsvegunum**

FERÐSLUTRYGD

Hesa ársins tíðina fer serliga nógv arbeiði hjá Landsverki fram á vegunum og í tunlunum kring landið. Tað er nevniliga í summarhálvuni, at starvsfólk hjá Landsverki mála strikur og asfaltera vegirnar.

Afturat hesum arbeiði skulu vegir og tunlar haldast reinir og ruddiligir alt árið, so framkoman er optimal og ferðslutrygdin í lagi fyri tey ferðandi. Grót verður ruddað av vegunum, skeltir skulu vaskast, ruskíløt fram við landsvegnum tømast og bussskýli verða vaskað og ruddað regluliga.

Hetta dagliga arbeiði mitt úti í ferðsluni á landsvegunum er ikki heilt vandaleyst. Tað er tí av alstórum týdningi, at bilførarar á landsvegunum eisini hava hetta í huganum - at ansa eftir okkara fólki úti á vegunum og inni í myrku tunlunum.

Bilførarar geva ikki skeltunum um at seta ferðina niður nóg stóran ans, og tí er tað ofta við lívinum í vága, at arbeitt verður á landsvegunum, siga tey á Landsverki.

*Kelda: www.landsverk.fo*



*Tað er av alstórum týdningi, at bilførarar á landsvegunum ansa eftir teimum, sum arbeiða úti á vegunum og inni í myrku tunlunum*

*Mynd: Landsverk*